# Leita eftir gomlum góðum

GAMALT-NÝTT

*tíðindaskriv*

Stuðulsbúðin Gamalt-Nýtt í Klaksvík sóknast eftir brúktum tingum, sum kunnu endurnýtast og seljast til frama fyri tað hjálpararbeiði, sum Danmissión ger á kristnum grundarlagi í londum í Afrika. Sóknast verður eftir brúks-lutum, møblum, búnyttum, skreytlutum, prýðislutum og líknandi, sum hevur eitt ávíst virði. Verða møblar og annað skift út, ella eru deyðsbúgv at taka upp, so set teg í samband við Malan Mýri á tlf. 456116-456820, sum hevur Stuðulsbúðina um hendi.

DMS, sum hesin felagsskapur nevndist fyrr, hevur nógv ár á baki í Føroyum, og nógvir ringar vóru ymsastaðni í landinum, sum stuðlaðu hesum arbeiði. Í nevndini fyri hesum felagsskapi í Føroyum eru: Sonja Klein, prestur, formaður, Tórshavn, Inga Dam Poulsen, prestur, næstformaður, Miðvágur, Sigvald Kristiansen, lækni, kassameistari, Skála, Sigrun Samuelsen, lærari, Klaksvík, Niels Juul Olsen, lastbilførari, Tórshavn, og Jónsvein Bech, prestur, Tvøroyri.

Øll hesi og onnur við vilja fegin hjálpa til við at samla saman og senda víðari til Stuðulsbúðina ting og lutir, sum fólk vilja lata til eitt gott endamál. Nevndar-limirnir taka eisini fegnir ímóti tilboðum frá fólki úr øllum Føroyum.

# Vestlaks hýsir Íslandsfiski

**Laksasmolt, sum Samherji hevur flutt úr Íslandi til Føroya, er á Selatrað, og kalvayngulin, sum kemur seinni í vikuni, skal til Vestmanna**

Aling
Edvard Joensen




*Laksasmoltið, sum er á smoltstøðini Sandá á Selatrað, kom við skipið úr Íslandi*

*Mynd: Edvard Joensen*

Íslendski alifiskurin, sum skal setast út í Føroyum, verður hýstur av Vestlaks, sigur Frímund Hansen, stjóri á Vestlaks.

Talan er um umleið 450.000 laksasmolt, sum eru komin við skipið úr Íslandi og nú ganga í kørum inni á alistøðini Sandá á Selatrað, sigur Frímund Hansen. Tá tey um eini tvey ár eru búgvin at taka, skuldu tey helst vigað eini 2.000 tons tilsamans, sigur stjórin á Vestlaks.

Smoltini skulu koppsetast móti ILA, áðrenn tey verða sett út. Koppsetingin verður gjørd í Føroyum, tí í Íslandi er ikki loyvt at koppseta móti ILA.

Tá smoltini eru klár at seta út, verða tey slept í aliringarnar hjá Vestlaks norðan fyri Svínáir, sigur Frímund Hansen.

– Tað kom ein fyrispurningur frá Samherja, og vit hava játtað, sigur hann.

Fríggjadagn koma ætlandi kalvarnir, sum Samherji ætlar at seta út í Føroyum, hendanveg úr Íslandi.

Frímund Hansen sigur, at Vestlaks eisini skal hýsa hesum fiskunum. Tað verður í einum tveimum ringum í Vestmanna, sigur hann.

Kalvarnir verða í skrivandi stund innskipaðir í Íslandi, og so velst um líkindi, um farið verður avstað beinanveg, verður sagt.

Hesir kalvarnir, sum nú koma, eru umleið30.000 í tali.

Tað hava í seinastuni gingið søgur um, at Samherji ætlar at keypa Vestlaks. Frímund Hasnen, stjóri á Vestlaks, vil hvørki vátta ella avsanna hesi tíðindi. Slíkt hevur hann ikki ávirkan á, sigur hann. Tað eru eigarin og ein møguligur keypari, sum mugu semjast um tað.

Men hann leggur afturat, at skal ein handil gerast, so er hetta rætta løtan at gera tað. Vit eru á botni í løtuni, og ES hevur lagt toll á norskan laks, vísir hann á.

# Country har vesturi

**Tað verður rættiligur western dámur á Giljanesi leygardagin. Vága Ríðingafelag skipar fyri djóradegi seinnapartin og country dansi um kvøldið**

WESTERN

*Edvard Joensen*



*Tiltakið hjá Vága Riðingafelag verður á Giljanesi frá klokkan 12 leygardagin*

**Vágar:**
Vága Ríðingafelag skipar fyri stórum tiltaki á Giljanesi leygardagin. Seinnapartin er tiltakið fyri tey yngru, og um kvøldið eiga tey tilkomnu tørn.

Tiltakið hjá Ríðingafelagnum byrjar á middegi í fjósinum hjá Jákupi Paula í Eyðansstovu, sum er beint innan fyri ítróttarhøllina á Giljanesi.

Har verða djór av nógvum ymsum sløgum at síggja. Bæði vanlig husdjór sum neyt og seyður, sonevnd kelidjór sum hundar, kettur og kaninir, og sjálvandi veðra ross eisini at síggja. Onkur kalkun og dvørghøna verður at hitta, umfrmat kálvar og lomb, nú lembingin er byrjað.

Skipað veðru fyri ponyríðing fyri børnunum og eisini verður sýning av rastri við seyðahundum út á seinnapartin, siga fyrireikararnir.

Sjálvandi verður okkurt leskandi at fáa til keyps saman við fronskum hotdogs og cowboyhattum, sum líkasum hoyra til í slíkum western umhvørvi.

Tað kostar 30,- krónur hjá vaksnum at sleppa til hetta tiltakið. Men børnini sleppa fyri einki. Djóradagurin á Giljanesi endar klokkan 18.00.

Um kvøldið sleppa tey vaksnu so upp í part. Tað byrjar stóri countrydansurin í ítróttarhøllini klokkan 23.00.

Har verður rættilgia gjørt burtur úr til at fáa rættan western dám. Vestmenn úr Vestmanna fara at spæla til dansin, og Ríðingarfelagið fer at skipa fyri sølu av ymsum, sum skal fáa ræta dámin fram. Tey fara at selja cowboyhattar, slips, turriklæði og slíkt, sum ein »rættur« cowboy eigur at ganga við. Eisini undir dansinum verður ymiskt til góman at fáa til keyps.

Millum seldu atgongumerkini verður lutaður ein flogferðaseðil burtur.

Atgongumerkið til dansin kostar kr. 120,-. Tiltakið er liður í innsavning hjá Vága Ríðingarfelag til ríðihøll og felagsfjós, sum felagið arbeiðir við at fáa í Vágum.

Leygardagin er ókeypis at koyra gjøgnum Vágatunnilin.